# Leiðaraskifti í Eik Banka




*Marjun Eystberg*




*Øssur Nolsøe*

Vinnulívsdeildin og størsta privatkundaøkið í Eik Banka fáa nú hvør sín nýggja leiðara

Eitt vaktarskifti fer nú fram á tveimum stórum og týðandi økjum í Føroya størsta bankasamtaki, Eik Banka.

Tann 1. mars byrja Øssur S. Nolsøe og Marjun Eystberg í hvør sínum leiðarastarvi í bankanum.

Marjun Eystberg, ið er 46 ára gomul, gerst leiðari fyri størsta privatkundaøkið hjá Eik, ið fevnir um Streymoy, Vágoy, Sandoy og Suðuroy. Samstundis gerst 45 ára gamli Øssur S. Nolsøe leiðari fyri Vinnulívsdeildina, ið hevur til uppgávu at røkja sambandið við vinnukundar kring alt landið.

Bæði koma úr øðrum størvum í Eik-samtakinum.

Øssur Nolsøe hevur í stívliga sjey ár røkt starvið, sum Marjun Eystberg nú fer í. Frammanundan hevur hann m.a. verið grannskoðanarleiðari í bankanum. Øssur S. Nolsøe er bankalærdur og hevur útbúgving su m cand. merc. aud. Harumframt hevur hann eina Master í leiðslu. Áðrenn hann kom í Eik, starvaðist hann sum grannskoðari í nøkur ár.

Marjun Eystberg hevur starvast í Eik-samtakinum síðan 2003, m.a. sum starvsfólkaleiðari fram til 2008 og virkandi starvsfólkaleiðari í Eik Bank Danmark. Hon er bankalærd og hevur eina Master í leiðslu. Hon hevur m.a. eisini havt starv í Jyske Bank.

Teir báðir Eik-leiðararnir eru limir í leiðslubólkinum hjá Eik, og har halda tey eisini fram eftir 1. mars.

---

Fyri 25 árum síðan:

# Jytte Mærsk stjóri á Hotel Borg

**Leygardagin 23. febrúar 1985 skrivar Sosialurin, at á tíðindafundi á Hotel Borg í gjár hevði stjórin, Jákup Joensen, boðað frá, at hann hevði sett 30 ára gomlu donsku Jytte Mærsk sum stjóra á hotellinum**

Eftir at Jákup Joensen fyrst í februar 1985 keypti Hotel Føroyar við Oyggjarvegin í Havn, sum skifti navn til Hotel Borg, søkti hann eftir nýggjum stjóra til hotellið. Tilsamans 11 umsóknir vóru til stjórastarvið.

Jytte Mærsk hevði útbúgving innan handil, og hevði arbeitt hjá DFDS í Danmark, umframt at hon eisini hevði arbeitt sum ferðaleiðari og hevði royndir innan hotelvinnuna. Astrid Kerber, sum hevði arbeitt á hotellinum, áðrenn tað læt aftur, varð sett sum sølustjóri á hotellinum.

*Tíðindablaðið Sosialurin skrivar m.a. at William Heinesen hevur fingið Sonningvirðislønina. Eisini hava Heri Niclasen og Søren Christensen frá Smyril Line síni boð upp á møguleikarnar hjá Norrönu*


tíðindablaðið sosialurin

Kanningar í Svøríki avdúka!

Dioxin frá brennistøð funnið í móðurmjólk

Kvinna stjóri á Hotel Borg

Okkara William millum heimsins mætastu

Gott bingo

---

## Andlát og jarðarferðir

Kistan við Arnold Nielsen, Strendur, fer úr Landssjúkrahúskapellinum fríggjdagin kl. 16. Jarðarferðin verður úr Sjóvar kirkju leygardagin klokkan 13.

**Heðin Hádal, Tórshavn**, andaðist á Landssjúkrahúsinum týskvøldið, 46 ára gamal.

**Kathrina Kjærbæk Jensen, ættað úr Tórshavn búsitandi í Miðvági**, andaðist sunnudagin, 31 ára gomul.

---

Kunngjørt verður fyri ætt, vinum og kenningum, at kæri pápi, verpápi, abbi og beiggi okkara

**Jógvan Fríðrik Kjølbro**

ættaður úr Klaksvík
búsitandi í Kanada

andaðist hósdagin tann 18. februar 2010, 69 ára gamal.

*Familjunnar vegna*
**Synirnir**

---

Sagt verður frá, at elskaði maður, pápi, sonur, bróðir, mammu og pápabeiggi, versonur og svágur okkara

**Heðin Martin Hádal**

andaðist á Landssjúkrahúsinum týskvøldið 23. februar, 46 ára gamal.

Jarðarferðin verður úr Hoyvíkar kirkju leygardagin 27. februar kl. 13.

*Familjunnar vegna*
**Benadikta og døturnar**

Tey, ið ynskja at minnast Heðin við blómum ella kransi, kunnu í staðin lata eina peningagávu til døturnar, konta í peningastovnunum.

---

## Merkisdagar



**30 ára føðingardagur**
27. mars fyllir Ruborg Haraldsen, Saltangará, 30 ár. Føðingardagurin verður hildin á Sjókafeini kl. 19. Tey, ið ynskja at heilsa uppá Ruborg, kunnu tekna seg á tlf. 310826 ella 256345 áðrenn 23. mars.

**70 ára føðingardagur**
26. feb. verður Maud Thomasen, 70 ár. Dagurin verður hildin á Marknalíð 13 frá kl. 18, har øll eru hjartaliga vælkomin.

**70 ára føðingardagur**
Sunnudagin 28. feb. verður Edna Beck, Tvøroyri, 70 ár. Dagurin verður hildin hjá dóttrini Kari Ann frá kl. 15.

**80 ára føðingardagur**
25. feb. verður Selma Heinesen, Klaksvík, 80 ár. Dagurin verður hildin á Brekku 16. Frá kl. 18.

**80 ára føðingardagur**
1. mars fyllur Henning Mortensen, Argjavegur 40, Argir, 80 ár. Dagurin verður hildin sunnudagin 28. feb. í AB-húsinum frá kl. 17.

**85 ára føðingardagur**
Mánadagin 1. mars verður Martin W. Tórgarð 85 ár. Dagurin verður hildin sunnudagin 28. feb. og tey, sum hava hug at heilsa uppá Martin, eru vælkomin inn á gólvið heima í Varðalág 3 ímillum kl. 14 og 17.

**Gullbrúdleyp**
Sunnudagin 28. feb. hava hjúnini Jóhanna og Arnold Højgaard, Kráargøta 56, Klaksvík, gullbrúdleyp. Tey eru burturstødd.

**Brúdleyp**
Páskadag 4. apríl giftast í Thyregod Kirke, Súsanna Joensen frá Svínoy og Kim Gotsæd. Tey ið ynskja at gleða okkum við at koma í brúdleyp, biðast vinarliga siga frá á tlf: 0045 26535429 áðrenn manadagin 15. mars.

**Brúdleyp**
Leygardagin 24. apríl giftast Joan Simonsen, Saltangará og Rúni Jallson Niclassen, Skáli. Vígslan verður í Glyvra kirkju kl. 14. Veitslan verður í Bygdarhúsinum í Leirvík kl. 19. Tey, ið ynskja at gleða Brúðarparið við at koma, verða vinarliga biðin um at tekna seg innan 10. apríl á tlf. 262713, 448051 (Joan) ella 256043, 441603 (Rúni).

**Konfirmatión**
Dýra Biðidag 30. apríl 2010 konfirmerast Sára Kristiansen, dóttur Ib og Thyra Kristiansen, í Stubbæk kirkju. Adr. Buen 63 - 6200 Stubbæk - Tlf. 48415615 / 20645615 / 22215605